tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 228 Fríggjadagur 28. november 1997 71. árgangur www.sosialurin.fo Kr. 7,00


Jóannes Eidesgaard formaður Javnaðarfloksins

## Nóg mikið er tosað

– Útjaðarin er heilt avgjørt eitt mál, sum verður ovaliga á dagsskránni, sigur Jóannes Eidesgaard, sum vísir á, at útjaðarin tapir fyri miðstaðarøkinum, tí ov lítið verður gjørt

Síða 4

# Føroyskur fiskur er ov dýrur

Tí vil danskur matvøruhandil sleppa at keypa føroyskan fisk uttan um millumhandlararnar. Annars verður fiskurin so dýrur, at hann selist ikki

Síða 10

## Nú rennur oljan á Atlantsmótinum



Fyri fyrstu ferð nakrantíð er farið undir oljuframleiðslu millum Føroyar og Hetland á Foinavenfeltinum

Síða 21

## Skikka tær væl, Nyrup

Vinstriflokkurin og teir Konservativu hótta Poul Nyrup Rasmussen. Broytir stjórnin ikki støðu í Føroyamálinum, er ikki óvist, at teir fara at royna parlamentariska vegin - at fáa nýval

Síða 12

GRUNDIG 100 Hz SJÓNVARP

100 Hz Grundig sjónvarp

...við stillari mynd!



Prísir:
25" prísur 10.200,-
Kontant: 9.200,-
28" prísur 11.330,-
Kontant: 10.200,-
Dømi um fígging:
Grundig 100 Hz. 25"
Útgjald 1060,-
REST: Um mán. í 24 mðr., bara
348,-

Vit útvega fígging!

- 100 Hz v/still picture
- Stereo
- Megalogic
- On Screen Display v/11 málum
- Top/Log Tekst-SV 8 síður
- 99/1 AV programm
- 15:9 umskiftari
- Wake up/Sleep/Snooze

ELDING
SMS tlf. 18662 · 18663 • Saltangará tlf. 48762

Allir prentlutir í góðum hondum hjá
HESTPRENT Spf.
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 14555 • Fax. 18026
e-mail: hestprnt@olivant.fo

# Nú rennur oljan á Atlantsmótinum

*Foinaven oljufeltið skamt frá føroyska fiskimarkinum fór í gjár undir fyrstu oljuframleiðsluna nakrantíð á Atlantsmótinum, vestan fyri Hetland. Tað eru gingin 25 ár síðani tað varð farið at bora í hesum nýggja økinum. Brúktar eru nógvar milliardir krónur til at bora teir 130 brunnarnar. Framleiðslan á Foinavenfeltinum kann eisini fáa stóran týdning fyri Føroyar og vinnu her. Tað hevur ljóðað, at útgerðar- og vaktarskip á feltinum eisini fara at brúka føroyskar havnir og tænastur og veitingar her. Foinavenfeltið liggur umleið miðskeiðis millum Føroyar og Hetland.*

JAN MÜLLER



Mikudagurin 26. november 1997 fer at verða ein søguligur dagur, tá oljusøgan um Atlantsmótið verður skrivað. Henda dagin klokkan 14.23 rann tann fyrsta oljan úr undirgrundini á Foinaven-feltinum upp umborð á risastóra framleiðslu- og goymsluskipið Petrojarl Foinaven.

Eftir at hava leitað og borað eftir olju og gassi vestan fyri Hetland í meira enn 25 ár er nú tann fyrsta kommersiella oljukeldan tikin í brúk, og um einar tíggju dagar fer eitt tangaskip at leggja upp fyrsta oljufarmin frá Atlantsmótinum nakrantíð í oljuhavnini í Flotta á Orknoyggjunum.

Foinaven oljukeldan varð funnin av BP og Shell í 1992 og liggur hon bert fáar fjórðingar frá føroyska markinum og er hon mett at goyma millum 250 og 500 mill. tunnur av olju.

Alt gekk sum tað skuldi, tá skrúvað varð frá á havbotninum miðskeiðis millum Hetland og Føroyar seinnapartin í gjár. James Jardine, pressutalsmaður hjá BP sigur við Sosialin, at teir eru sera væl nøgdir við úrslitið, nú fyrsta oljukeldan vestan fyri Hetlandi er tikin í brúk.

-Vit hava sett tríggjar av brunnunum til og fara komandi dagarnar at taka enn 5 brunnar í brúk. Í vár verður so helst alt økið við í framleiðsluni og verður framleiðslan tá umleið 100.000 føt um dagin.

Tað er stóra bretska oljufelagið BP, sum er operatørur. Saman við Shell hevur BP arbeitt við at menna feltið nú í góð 6 ár. Hóast teir hava verið noyddir at umvæla og broyta nakað av útbúnaðinum, sum er settur upp á havbotninum, og tað tí hevur útsett ætlanina nakað, so hevur tað kortini eydnast at fáa framleiðslu í gongd uppá mettíð. Ongantíð áður er tað gingið so skjótt frá at ein oljukelda er funnin til hon kann fara undir framleiðslu.

Stjórin í BP John Browne sigur, at tað hevur sjálvandi verið stórt spell, at ætlanin er vorðin seinkað nakað, men hann heldur tað vera einki minni enn eitt bragd, at tað hevur eydnast at fáa hesa fyrstu framleiðsluna á djúpum vatni og í einum heilt nýggjum øki í gongd bert trý ár, eftir at endaliga loyvið varð fingið uppá pláss.

-Eg haldi, hóast hesa seinking, at henda væleydnaða og tøkniliga sera framkomna verkætlanin við einum flótandi framleiðsluskipan er ein týðandi varði í bretskari oljusøgu og fyri BP eisini.

Andy Dawson, sum hevur staðið á odda fyri verkætlanini sigur við Sosialin, at teir við hesum projektinum hava slóðað fyri heilt nýggjum arbeiðsháttum og hugsanum í sambandi við bæði trygd og umhvørvi. Vit hava sett út í kortið ein heilt nýggjan útvikling á hesum økjum. At tað hevur eydnast at fáa framleiðsluna í gongd bert fimm ár eftir at Foinaven feltið varð funnið og hetta í einum umhvørvisliga sæð sera torførum øki er ein stórhending.

BP hevur gjørt nógv burturúr at laga hesa fyrstu framleiðsluna vestan fyri Hetland til øll hugsandi krøv, sum eitt reint umhvørvi setir. Í fjør vórðu teir varugir við skeivleikar í parti av útbúnaðinum, sum varð settur upp á havbotninum og hesin mátti takast uppaftur og umvælast. Síðani hevur umhvørvisfelagsskapur Greenpeace roynt at seta BP forðingar í vegin. Greenpeace vil vera við, at oljuframleiðsla á Atlantsmótinum sum heild er ein álvarssom hóttan móti djóra- og plantulívinum í havinum.

Jamie Jardine, sum er pressutalsmaður hjá BP og sum tekur sær av økinum vestan fyri Hetland burturav sigur við Sosialin, at tað gongur sum ætlað at fáa tí næstu oljukelduna í framleiðslu eisini. Tað er um oljufeltið Schiehallion, sum liggur nærhendis Foinaven. Hetta feltið er væl størri og er ætlanin at fáa fyrstu oljuna upp næsta summar.

Heimsins størsta framleiðsluskip verður bygt í Belfast og verður klárt at taka í brúk í januar. Tá fer tað so leiðina til leiðina við føroyska fiskimarkið.

Henda verkætlanin, sum er ein av teimum heilt stóru hjá BP og tess partnarum, fer at kosta 10 milliardir krónur, tá hon er liðug.

Jamie Jardine upplýsir annars, at tað nú eisini verður arbeitt miðvíst við at fáa í gongd eina framleiðslu frá tí risastóra Clairoljufeltinum, sum varð funnið í 1977. Men av tí at goymslurnar har eru so serstakar og oljan sera tjúkk hevur tað higartil ikki verið mett lønandi at taka oljuna upp. Men nógv er broytt uppá 20 ár, og í dag halda oljufeløgini, sum eiga kelduna, at ein framleiðsla møguliga kann byrja stutt eftir aldarskiftið.

BP hevur síðani eisini ætlan um at gera framleiðsluroyndir frá eini aðrari keldu. Tað er Suilven, sum liggur heilt stutt frá føroyska fiskimarkinum.

*Oljuvinna skamt frá føroyska markinum nú veruleiki*

Tað er her í grannalagnum, í tí Hvíta økinum, at bretska stjórnin hevur kannað sær tveir blokkar og sum hon hevur latið oljufeløg bjóða uppá. BP er eitt av feløgunum, sum fegið vil hava hesar blokkar og nógv bendir á, at felagið fer at fáa í hvussu er annan av blokkunum, nú Suilvenkeldan liggur tætt uppat blokkinum og helst gongur inn í sjálvan blokkin.




Soleiðis sær skipanin út, sum nú er tikin í brúk nærhendis føroyska markinum.